## Betri skil á kuldanum



Hvønn dag boðar danska veðurstovan DMI frá, hvussu veðrið verður í Grønlandi, men veðurfrøðingarnir hava havt ógvuliga ilt við at meta um, hvussu kalt tað verður, tá tað er kalt og klárt í veðrinum. Tí hevur DMI nú tikið stig til at fáa betri skil á kuldanum, sigur Carsten Simonsen, leiðari, við KNR. Hann vísir á, at onkuntíð hevur kuldametingin hjá veðurfrøðingunum verið heili 20 stig við síðuna av, men nú verður betur, sigur hann.

## Prestur heldur fyrilestur um gott lív

**Sundalagið:** Á Sunda Bókasavni skipa tey javnan fyri ymsum og mikukvøldið er enn eitt forvitnisligt tiltak á skránni. Klokkan 19 mikukvøldið fer Kristine Stricker Hestbech, prestur í Havn, at halda fyrilestur um evnið, ið hon kallar »Tráanin eftir tí góða lívinum« sigur Sunda Kommuna á síni heimasíðu. Kristine Stricker Hestbech er nógv umbiðin at halda fyrilestrar og hon er væl kend, eitt nú frá kjaksendingunum »Tal med Gud« hjá Danmarks Radio. Hon hevur eisini verið limur í eini nevnd hjá donsku stjórnini, ið nevndist http://www.familieogarbejdsliv.dk/forside/ Familie- og Arbejdslivkommissionen, sum kannaði javnvágina millum familju- og arbeiðslív hjá fólki.

# Ein »voyager« á veg til Kl



*Brandur Nólsoy hevur verið heima, síðan hann kom aftur av Atlantic Navigator 6. juli. Nú bendir mangt á, at hann skjótt sleppur avstað aftur*

*Mynd: Jens Kr. Vang*



**Líkt er til, at tað gongur ikki long tíð, til P/F Næraberg ella JFK-Trol fær eitt skip í flotan fyri Atlantic Navigator, sum fór úr føroyska fiskiskipaflotanum í fjør heyst**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í seinastu viku frættist, at felagið í Klaksvík, sum fyrst rak Næraberg og seinni Atlantic Navigator, er komið rættiliga langt við einum øðrum skipi, sum sambært keldum hjá Sosialinum kalllast Voyager.

Keldurnar siga, at ætlaninar eru komnar so langt, at onkur av manningini, sum var við Atlantic Navigator, hevur fingið kjans við nýggja skipinum, eitt nú skiparin Brandur Nólsoy.

### Einki endaligt

Hanus Hansen, stjóri í JFK-Troli, hevur ikki hug at gera nakrar serligar viðmerkingar til málið beint í løtuni, tí enn er einki endaligt, sum hann tekur til.

Reiðarin leggur kortini aftrat, at gongst, sum felagið ætlar, hevur hann vónir um, at málið verður endaliga greitt um heilt stutta tíð.

Spurdur, um skipið, sum felagið ætlar at seta í flotan fyri Atlantic Navigator, kallast Voyager og er eitt ídnaðarskip, sigur Hanus Hansen, at tað kann hann ikki siga í løtuni.

- Tað er ov tíðliga at siga nakað um hetta enn, tí so langt er málið ikki komið. Vit arbeiða við málinum, leggur hann aftrat.

Reiðarin váttar, at felagið hevur arbeitt við ymiskum møguleikum, síðan Atlantic Navigator fór úr føroyska fiskiskipaflotanum.

- Vit eru ógvuliga nær við eina loysn, um alt gongur, sum vit vilja, men best hevði verið, um tit bíðaðu við at skriva nakað, til málið er endaliga avgreitt, sigur Hanus Hansen.

### Hava søkt

Bjørn Kalsø, landsstýrismaður í fiskivinnumálum, váttar, at felagið í Klaksvík hevur søkt um ymiskar møguleikar at fáa annað skip í flotan fyri Atlantic Navigator.

- Felagið hevur samskift við Fiskimálaráðið um ymiskar møguleikar, og vanligt er, at umsitingin kunnar landsstýrismannin og kemur við einum tilmæli, tá ið málið er komið so langt, at tað er búgvið til støðutakan.

Bjørn sigur, at hann er ikki fullgreiður yvir, hvussu júst hetta málið liggur beint í løtuni, tí hann hevur havt so nógv um oyruni seinastu tíðina.

- Sum eg havi skilt, miðjar felagið í Klaksvík fyrst eftir eini fyribilsloysn, sum seinni skal gerast ein endalig loysn. Í hesum liggur, heldur landsstýrismaðurin, at felagið fyrst kemur við einum ídnaðarskipi – og seinni við einum verksmiðjuskipi, sum kann virka fiskin umborð.

Hann sigur, at felagið soleiðis hevur søkt um loyvir í ymiskum »stigum«, men hvat endaliga fer at spyrjast burtur úr hesum, kann hann ikki siga beint í løtuni.

### Eiga rættindi

Vit spurdu eisini Bjørn Kalsø, um felagið, sum rak Næraberg og seinni Atlantic Navigator, framvegis eigur hesi kvoturættindi.

- Siðvenjan og reglan plagar at vera, at tá ið eitt skip sum Atlantic Navigator fer úr føroyska fiskiskipaflotanum, hevur felagið, sum rak skipið, eina standandi tilsøgn um hesi rættindi í tvey ár. Soleiðis plagar tað at vera, og rættindini hjá Atlantic Navigator eru ikki flutt yvir á onnur skip í hesum tíðarbili, sigur landsstýrismaðurin.

Tá ið P/F Næraberg tíðliga í fjør summar kunngjørdi, at felagið fór at taka Atlantic Navigator úr føroyska fiskiskipaflotanum, tók spurningurin seg upp, um framleiðsluskylda liggur á hesum rættindum, soleiðis at tey ikki kunnu